# MØGULIG ÁKÆRA MÓTI ATHENU

**EFTIRLIT** Í fyrsta lagi hava vit verið umborð á skipinum og hava fingið staðfest, hvat fer fram. Nú fara vit at kanna eftir, um brot eru framd á útlendingalógina og møguligar kunngerðir, sum eru galdandi í Føroyum, sigur Bergleif Brimvík, politikommiserur

Vilmund Jacobsen




*Athena liggur uttaná einum frystifarmaskipi við nýggja havnalagið á Oyrareingjum og avskipar veiði*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Seinnapartin mikudagin var løgreglan umborð á stóra fiskiskipinum Athenu, sum Thor í Hósvík eigur. Løgreglan fór umborð, meðan skipið lá uttaná einum frystifarmaskipi, sum lá við nýggja havnarlagið á Oyrareingjum.

Athena var komin á Kollafjørð við veiði, sum skuldi skipast umborð á frystifarmaskipið, og tað var manningin umborð, sum skipaði veiðina yvir.

Bergleif Brimvík, politikommiserur, sigur, at orsøkin til, at løgreglan fór umborð á Athenu, er, at ivi hevur verið sáddur um, hvørt útlendska manningin umborð á Athenu hevur loyvi at arbeiða umborð, meðan skipið er í føroyskum sjógvi og føroyskari havn.

### Kannar málið

– Vit eru eftirlitsmyndugleiki á útlendingaøkinum, og tí var tað okkara uppgáva at fáa staðfest, hvat fer fram umborð á skipinum.

Politikommiserurin vísir á, at fyribils er staðfest, at tað var manningin umborð á Athenu, sum skipaði veiðina av Athenu og umborð á frystifarmaskipið.

– Sambært svarinum, sum landsstýriskvinnan hevur fingið frá danska Integratiónsministeriinum, kann umskiping fara fram innanfyri 12 fjórðingar, men eg havi skilt, at slík umskiping við útlendskari arbeiðsmegi ikki eigur at fara fram, meðan skipið liggur við bryggju.

Bergleif Brimvík leggur kortini aftrat, at løgreglan fer at hyggja nærri at málinum og svarinum hjá Integratiónsministeriinum, áðrenn støða verður tikin til, um meiri skal henda.

### Møgulig ákæra

Spurdur, um væntast kann, at ákæra møguliga verður reist móti reiðarínum, sigur politikommiserurin, at tað dugir hann einki at siga um í løtuni.

– Í fyrsta lagi hava vit verið umborð á skipinum og hava fingið staðfest, hvat fer fram. Nú fara vit at kanna eftir, um brot eru framd á útlendingalógina og møguligar kunngerðir, sum eru galdandi í Føroyum.

Sum skilst á Bergleifi Brimvík er tað ikki óhugsandi, at løgreglan fer at reisa ákæru móti reiðarínum, men fyrst skulu neyðugu kanningarnar gerast, og fyrr enn málið og viðurskiftini eru kannað út í æsir, dugir hann ikki við vissu at siga, hvussu verður.

Hann væntar tó ikki, at tað fer at taka langa tíð, áðrenn ein niðurstøða fyriliggur í hesum máli.

– Í løtuni dugi eg ikki at siga, hvat útfallið verður – antin ákæra verður reist í málinum ella ikki, sigur Bergleif Brimvík, politikommiserur.

**»...í løtuni dugi eg ikki at siga, hvat útfallið verður...**
BERGLEIF BRIMVÍK

*vilmund@sosialurin.fo*

# – Nú hava vit eina nýggja støðu

**ATHENA** Landsstýriskvinnan í lógarmálum, Annika Olsen, sigur, at henni kunnugt skuldi Athena ikki umskipa veiðina við bryggju, men úti á havinum. – Nú hava vit eina nýggja og keðiliga støðu, sigur landsstýriskvinnan

Vilmund Jacobsen

Sum skilst, er tað komið Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í lógarmálum, eitt sindur dátt við, at Athena hevur ligið við bryggju, meðan útlendska manningin hevur skipað veiðina umborð á eitt frystifarmaskip.

– Vit hava ikki spurt Integratiónsministeriið um júst tann spurningin, tí hetta var mær vitandi ongantíð upp á tal. Nú skilji eg á løgregluni, at útlendska manningin hevur skipað veiðina umborð á annað skip, meðan skipini hava ligið við bryggju, og tá hava vit eina nýggja og keðiliga støðu.

Annika Olsen, landsstýriskvinna, hevði annars spurt Integratiónsministeriið, hvussu Føroyar skulu fyrihalda seg, nú skipini hjá Thor í Hósvík, Athena og Poseidon, eru virkin í føroyskum sjógvi eina tíð – við útlendskari manning umborð.

– Svarið er, at uttanfyri 12 fjórðingar krevst ikki, at útlendska manningin hevur arbeiðsloyvi í Føroyum. Eru skipini í føroyskum sjógvi eitt styttri tíðarskeið, kann umskiping fara fram nakrar fáar ferðir einar innanfyri 12 fjórðingar. Verður veiðan umskipað reguliga yvir eitt longri tíðarskeiði, krevst eisini arbeiðsloyvi innanfyri 12 fjórðingar.

Annika Olsen vísir á, at nú løgreglan hevur staðfest, at útlendska arbeiðsmegin umborð á Athenu hevur umskipað veiði, meðan skipini hava ligið við bryggju, er hetta ein nýggj og keðilig støða.

– Eg haldi, at tað er ein avgerandi munur, tá avskipað verður á opnum havi – og við bryggju, leggur landsstýriskvinnan aftrat.

Hon sigur seg tó ikki duga at meta um, hvørt hetta fer at fáa avleiðingar fyri reiðaríið ella ikki.

– Løgreglan er eftirlitsmyndugleikin á útlendingaøkinum og er í løtuni í holt við at kanna málið. Um málið ikki fær nakrar avleiðingar, tí hetta kanska bara hendir ta einu ferðina – ella, um henda eina ferðin fer at elva til, at ákæra verður reist, liggur ikki í mínum hondum.

– Nú fáa vit at síggja, hvør úrskurðurin hjá løgregluni verður, leggur hon aftrat.

Sjálv heldur landsstýriskvinnan, at hetta málið hevur fingið eina keðiliga vend, nú tað er greitt, at avskiping er farin fram við útlendskari arbeiðsmegi, meðan skipið hevur ligið við bryggju.

– Men, sum sagt, eri eg ikki før fyri at meta um, hvat – og um nakað – kann spyrjast burtur úr hesum, sigur hon.

Annika Olsen vísir at enda til fiskiloyvi hjá skipinum, har manningin henni kunnugt ikki hevur fingið loyvi til at umskipa veiði í føroyskari havn.

– Henda vend, sum málið nú hevur fingið, undrar meg tí eitt sindur, og eg haldi, at hetta er keðiligt, sigur landsstýriskvinnan í lógarmálum.

*vilmund@sosialurin.fo*